

Í oljuhavnini í Runavík eru trygdarviðurskifti í hásæti. Óviðkomandi sleppa ikki inn á arbeiðsøkið. Nú sleppa føroyingar kortini at vitja umborð á einum av okkara framkomnu frálandaskipum, og tað verður í Havn í dag. Mynd: Jan M

# Føroyingar vælkomnir umborð á Sjóborg undan boring

**Jan Müller**

09.05.2014 - 10:00

Oljan.fo

**Føroyingar bíða nú í spenningi eftir, at risastóri oljupallurin West Hercules skal seta á føroysku undirgrundina og verður hetta ein av døgunum. Hóast pallurin er útlendskur, so fara føroyskar hendur og fyritøkur kortini at hava ein týðandi leiklut í hesi stóru verkætlan. Ein teirra er Skansi Offshore, hvørs skip Sjóborg skal vera veitingaskip til boripallin komandi hálva árið.**

Nú kunnu so allir føroyingar eisini síggja eitt av føroysku frálandaskipunum, sum hevur tænt í Norðsjónum og sum fyrstu ferð er komið til Føroyar at luttaka í oljuleitingini á

landgrunninum.

**Skansi Offshore bjóðar til opið skip umborð á Sjóborg.**
Sjóborg kom til oljuútgerðarhavnina í Runavík í vikuni og ger nú klárt til at vera veitingarskip hjá boripallinum West Hercules, sum skal bora tveir brunnar fyri Statoil og onnur oljufeløg.

Reiðaríið Skansi Offshore metir tað vera eina stóra hending, at eitt av tess skipum kemur til Føroya at vera partur av oljuleitingini og vil nú vísa skipið fram fyri føroyingum. Hetta hendir í dag millum kl. 16 og 18, har vitjandi hava møguleika at síggja skipið og hitta skipara og manning. Skipið fer at liggja á Vestaru Bryggju í Havn.

Sjóborg hevur síðani hon varð latin eigarunum í mars 2012 havt ymsar veitingaruppgávur í Noregi, við basu eitt nú í Bergen, Sandnessjøen og Kristiansund.

Oljan.fo vitjaði umborð á Sjóborg í gjár. Lesið samrøðu við skiparan á oljuportalinum seinni í dag.